

*- Her er nóg mikið at finna, sigur Jósup Davidsen, sum ruddaði í eini á á Norðoyri*

*Ein einstakur dagur at rudda her í Klaksvík er alt ov lítið. Her mugu nógvir dagar til, tí her liggur órudd og sløðist allastaðni*
*(Klaksvíkingur)*

*Um hvør ger sítt, so hevði tað verið nossligt her í bygdini*
*(Jósup Davidsen, Norðoyri)*

*Hvør einstakur hevur eisini ábyrgd fyri tí, ið vit hava fingið at umsita frá Skaparans hond, og eiga vit eisini at hugsa um næsta ættarliðið*
*(Steinbjørn O. Jacobsen, borgarstjóri)*

vorðin so lítil, og vit vita, hvørji árin standast av ovurhiting og dálking annars.

- Hvør einstakur hevur eisini ábyrgd fyri tí, ið vit hava fingið at umsita frá Skaparans hond, og eiga vit eisini at hugsa um næsta ættarliðið, segði borgarstjórin millum annað í heilsan síni.

Spurningurin er so, hvat kann gerast betri næstu ferð!



*Plantupakkarnir vóru væl umtóktir, og fara planturnar nú at prýða hundraðtals urtagarðar í Klaksvík*

# Skrá fyri leygardagin

Ruddingar- og trivnaðardagur fyri allar borgarar í Klaksvíkar kommuna.

**Kl. 10**

Vit møtast øll í Ósáskúlanum til rundstykkir og kaffi. Klaksvíkar Hornorkestur spælir léttan horntónleik, og Rani Nolsøe, formaður í Heilsu- og umhvørvisnevndini setur dagin.

Síðani verður farið út at rudda til kl. 13. Vit møtast aftur til lætt ábit, og Hans Hjalti Skaale fer at syngja nakrar sangir.

Plantupakkin verður útflýggjaður í hølunum hjá býargartnaranum í kjallaranum undir Skýlinum millum kl. 13 og 15 til teirra, ið hava fingið útflýggingarseðil.

*(Brot úr faldaranum um umhvørvisvikuna)*